# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Hans Jacob Højgaard 100 ár:

## Myndaframsýning og áhugaverdar hugleiðingar á Toftum



Fyri fullsettum húsi hevði Ólavur Hátún nakrar sera áhugaverdar hugleiðingar um tónaskaldið Hans Jácob Højgaard



Hans Jacob Højgaard (1904–1992)

**Leygarkvøldið 4. september læt ein framsýning upp í kjallaranum á Fríðrikskirkjuni á Toftum um tónaskaldi Hans Jacob Højgaard. Komandi leygardag eru liðin 100 ár síðan hann var føddur**

Nógv fólk vóru komin saman í kjallaranum í Fríðrikskirkjuni seinasta leygarkvøld, tá ein framsýning við myndum læt upp kl. 19.00.

Á framsýningini eru m.a. myndir og avísútklipp frá konsertferðum í Føroyum og uttanlands.

Kl. 20.00 hevði Ólavur Hátún áhugaverdar hugleiðingar um tónaskaldið Hans Jacob Højgaard. Hann segði m.a. "hann er gitnasta kórleiðaranavn í Føroyum higartil.

Á Toftum brúkti hann ikki ljóðføri, men sang kórinum stemmurnar inn í sál og sinni og kom soleiðis á heilt serligan hátt til at seta sín persónliga dám á framburð og tónalag. Upplesari var hann av teim allarbestu og hevði hartil sannførandi sjónleikaragávur.

Tað, sum dreiv verkið, var tann persónliga útstrálingin, ein sinnislig megi, sum eg neyvan havi kent makan til.

Hvussu tíðliga Hans J. Højgaard veruliga visti til sín sum tónaskald, dugi eg ikki at siga nakað um. Vit hava hoyrt um, at hann longu sum smádrongur spældi sær við ljóðum og rytmum.

At lýsa persónin Hans Jákup Højgaard við orðum er ikki so einfalt. Hann var ein samansett natúr við nógvum og sterkum lyndiseyðkennum. At síggja til var hann heldur illbrýntur, og onkur spurdi nú út fra myndini av honum, um hann altíð var so bítskur. Nei, tað var hann ikki, hann kundi vera bæði eymur, stuttligur og kátur.

Um Hans Jacob Højgaard verður sagt, at hann frá barnsbeini var øðrvísi enn onnur børn, sat ofta fyri seg sjálvan og ruggaði og sang og gav gætur eftir ljóðligum viðurskiftum".

Framsýningin verður opin týskvøldini 14. og 21. september frá kl. 19-21.



Kórleiðarin hjá kirkjukórinum á Toftum, Mikael Johan Heinesen, og Ólavur Hátún, kórleiðari



Christian Høgagarð, bróðursonur tónaskaldið, og Mortan Højgaard, sum nú er bóndi á Regnagarðinum, haðani Hans Jacob Højgaard var ættaður



Solveig Steinhólm á Toftum, bróðurdóttir, og Krista Otthamar úr Havn, abbadóttir Hans Hans Jacob Højgaard



Stórur áhugi var fyri framsýningini, f.v. Karin Kastalag, sum er ein av teimum sum stendur fyri framsýningini, og Maria av Steinum úr Kollafirði



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir o.t.

### Jógvan Gregersen 45 ár



Í dag, mikudagin 8. september, verður Jógvan Gregersen í Norðragøtu 45 ár. Jógvan er gøtumaður so tað stendur eftir í. Mamman er Berlina, sum er ættað frá Norðuri við hús í Syðrugøtu, og pápin var Per Gregersen ella Per hjá Jóan Paula, sum var úr Norðragøtu. Per doyði fyri átta árum síðani.

Jógvan er nummar trý í røðini av teimum fýra børnunum hjá Berlinu og Peri. Árni býr á Bornholm, og Sonja, Jógvan og Magnus búgva øll í Norðragøtu. Jógvan, sum bygdi ikki so langt frá barndómsheiminum, situr við Jørðistovufestinum.

Í mong ár var Jógvan virkisleiðari á Fiskavirk-inum í Gøtu. Síðani var hann eitt stutt skifti á Fiskasøluni, og fyri knøppum trimum árum síðani gjørdist hann stjóri á Vaðhorn á Strondum. Har man lagið vera hampuliga gott, tí í fjør varð virkið kosið at vera ársins virki.

Jógvan var bygdarráðsformaður í Gøtu kommunu 1997-2000, og hann hevur í nógv ár verið nevndarlimur í Gøtu Ítróttarfelag. Síðst í níti árunum var hann formaður eitt skifti, og nú er hann aftur formaður.

Jógvan Gregersen var á GÍ unglingaliðnum, sum var føroyameistari í 1976 og í 1977. Tá var tað, at lunnar av álvara vóru lagdir undir glæsiligu fótbóltsavrikini hjá gøtumonnum. GÍ vann 2. deild í 1979, og Jógvan var eisini á liðnum, sum í 1983 vann fyrsta av higartil seks meistaraheitum til Gøtu.

Í 1976, 1977 og í 1978 var Jógvan á unglingalandsliðnum. Jógvan royndi seg eisini tvær ferðir á landsliðnum. Tað var í heimadystum ímóti Hetlandi í 1981.

Jógvan Gregersen er giftur við Sigvør, sum er fødd Justinussen og ættað úr Norðragøtu. Hon er pedagogur og arbeiðir sum stovnsleiðari í høvuðsstaðnum. Tey eiga trý børn: Lív, Per Martin og Bergur.

Eivindur í Gongini, listamaður:

## Indisk málningaframsýning í Smiðjuni



Í dag letur Eivindur í Gongini upp eina indiska málningaframsýning í Smiðjuni

Mynd: Jens Kristian Vang

Í dag, mikudagin 8. september kl. 14.00, letur Eivindur í Gongini upp eina øðrvísi málningaframsýn-ing í Smiðjuni í Lítluvík.

Á framsýningini er 40 oljumálningar. Myndaevnini eru øll úr India, har hann hevur búð seinastu fimm árini. Hann býr í eini lítlari bygd við Malabar strondina í Miðindia.

Eivind sigur, at størsta avbjóðingin hjá honum er, at sólin altíð stendur mitt á himmalinum um dagin, har sum hann býr, tí eru eingir skuggar, mótsatt her í Føroyum.

Framsýningin er opin til og við sunnudagin 12. september, allar dagar frá kl. 14-20.

### Dagurin

**8. september. Mariumessa um heystið.** Hildin sum føðingardagur Mariu. Dagurin er dilkadagur. Tríggir dagar um heystið verða nevndir dilkadagar. Teir eru mariumessa 8. september, mikkjalsmessa 29. september og allahalgannadagur 1. november. Tá var okkurt serstakt havt til matna, helst av seyði, og dilkur var tann matur róptur, sum etin varð.

†

Kunngjørt verður at mín elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi okkara

**Thomas Arge**
**Tórshavn**

andaðist á Landssjúkrahúsinum mánadagin 6. september, 66 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin 9. september kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*
**Sólrun**
**Hildur, Fía og Regin**

**Tøkk**

Vit vilja av hjarta takka øllum fyri sýnda samkenslu í stóru sorg okkara, tá elskaði sonur, beiggi, svágur, pápabeiggi og mammubeiggi okkara

**Petur Andre Norðgerð**
f. 31.3.63 – d. 26.7.04

doyði og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk fyri mong troystarrík orð.
Tøkk fyri mangar hjálpandi hendur.
Tøkk til tey, sum fylgdu honum til hansara hvíldarstað.
Tøkk til øll, sum ringdu og sendu heilsanir annars.
Tøkk til øll, sum vundu Merkið á stong.

*Vegna tey avvarðandi*
**Selma, Kaj, Magni, Allan, Niklas Sofus, Onika og Ruth**

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til og vístu samkenslu, tá ið høgt elskaða kona mín, mamma, vermamma og omma okkara

**Jonna Nielsen**
Sandavágur

varð sjúk, doyði og varð jarðað.

Tað gleddi hana og fløvar okkum at vita seg umgyrdan av einum so stórum vinaskara.
Eingin nevndur, eingin gloymdur.
Eisini takk fyri peningagávurnar til kirkjuna og meinigheitshúsið í samband við jarðarferðina.
Við ynskjum um Guðs ríku signing yvir hvønn einstakan.

*Familjunnar vegna*
**Heini**
**Rannvá, Niels Marni og Marjon við familjum**